**LØGMÁLARÁÐIÐ**
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. august 2025
J. nr.: 25/21814-2

**Svar**

**til**

**fyrispurning nr. 52-003/2025 eftir § 52 a í Tingskipanini um viðgerðartíðir hjá Útlendingastovuni, frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni.**

**Spurningurin var soljóðandi:**

Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at stytta viðgerðartíðirnar hjá Útlendingastovuni í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi?

**Svar:**

Málsøkið "útlendingamál" er ikki yvirtikið, men er framvegis danskt málsøki. Broytingin, sum hendi á økinum í fjør heyst, var tann, at sjálv málsviðgerðin av arbeiðs- og uppihaldsloyvum til Føroyar, varð flutt til Føroyar, sambært heimiling í § 46 c í útlendingalógini fyri Føroyar (Anordning nr. 182 af 22. Marts 2001 for ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, sum seinast broytt við anordning nr. 666 frá 4. Juni 2025), og nú fer fram á Útlendingastovuni.

Tað er ein sannroynd, at málsviðgerðin hjá Útlendingastovuni av arbeiðs- og uppihaldsloyvum tekur longri tíð enn ynskiligt, serliga tá talan er um leingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvum.

Í svari, dagfest 18. juni í ár, til § 52 a fyrispurning frá Magnus Rasmussen, løgtingsmanni, greiddi eg frá, at orsøkin til longu viðgerðartíðinar er samansett. Økið er nýtt, og tí er neyðugt hjá Útlendingastovuni at menna mannagongdir, málsviðgerðarskipanir og fakligar førleikar, samstundis sum sjálv málsviðgerðin fer fram, og ger hetta arbeiðsgongdina meira tíðarkrevjandi.

Harumframt er stovnurin lítil og hevur ikki møguleika at gagnnýta teir fyrimunir, ið størri eindir hava, so sum journaleindir, móttøkueindir, uppbýtta málsviðgerð og automatiseraðar skipanir.

Gongin 7 • Postrúm 377 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 80 80 • ✉ lmr@lmr.fo • www.lmr.fo

Útlendingastovan arbeiðir tó miðvíst við at styrkja innanhýsis skipanir, tryggja betri yvirlit yvir málsbyrðu og málsstøðu, menna fakligu førleikarnar á økinum, og broyta arbeiðsbýtið innanhýsis, har tað ber til, fyri at fáa málsviðgerðina at ganga skjótari.

Arbeiðsbyrðan á Útlendingastovuni verður eyka tyngd av, at skipanin við uppihaldskortum av misgáum fall burtur, tá málsviðgerðin varð flutt til Føroyar. Hetta merkir, at Útlendingastovan í løtuni má skriva út afturferðarloyvi til hvønn einstakan útlending, sum ferðast úr Føroyum. Higartil hevur Útlendingastovan skrivað út umleið 700 afturferðarloyvir. Løgmálaráðið hevur javnt og samt heitt á Udlændinge- og Integrationsministeriet um at loysa hendan trupulleikan, og gongd er nú í hesum málinum. Tá hesin trupulleikin er loystur, fer tað væntandi at lætta nakað um arbeiðsbyrðuna á Útlendingastovuni.

Tað er tó vorðið greitt, at hóast royndir at effektivisera arbeiðið á Útlendingastovuni, so er neyðugt, at Útlendingastovan fær fleiri starvsfólk, um málsviðgerðartíðirnar skulu styttast.

Eg arbeiði tí í løtuni við at finna eina loysn á hesum og eri í samskifti við viðkomandi partar um, hvussu hesin trupulleikin kann loysast á ráðiligan hátt.

Eg meti, at samanumtikið fara omanfyri nevndu tiltøk at stytta um viðgerðartíðirnar hjá Útlendingastovuni.

Løgmálaráðið, tann 25. august 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður